# Starvsfólk til søludeildina

Søkt verður eftir einum royndum fólki til at taka sær av øllum viðurskiftum viðvíkjandi sjúklingaferðum fyri føroysku sjúkrahúsini.

Talan er um starvsfólk, ið skal starvast sum Corporate Implant hjá føroysku sjúkrahúsunum.

**Hetta er fulltíðarstarv sum m.a. fevnir um:**

- At taka sær av øllum bíleggingum av sjúklingaferðum og fylgjarum hjá føroysku sjúkrahúsunum. Árliga er talan er um umleið 4500 bíleggingar til sjúk og avvarðandi
- At bíleggja og samskipa sjúklinga- og leiguferðir ímillum sjúkrahúsini og Atlantic Airways
- At samskifta við SAS Medical um m.a. góðkenning við MEDIF kravi og SAS Ground Service um m.a. blokkering av plássi til børur o.l. í innskrivingarskipanum
- At avgreiða bílegging av sjúkraflutningi til og frá flogførum til børu og sitting sick
- At ráðgeva um pláss í flogførum, og umsita allotments
- At boða avvarðandi myndugleikum frá hagtølunum fyri sjúkraferðing
- At finna loysnir, sum eru best og rímiligast fyri bæði sjúkrahúsini og brúkaran

**Førleikakrøv:**
Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur:

- Útbúgving innan skrivstovuyrki
- Drúgvar royndir innan bókingarskipanir (Amadeus), kunnleika til ferðaseðlasølu og umsiting av hesum
- Hollar royndir við at arbeiða og samskifta umvegis teldu og telefon
- Hevur evni at samstarva og er ágrytin
- Kann arbeiða sjálvstøðugt og undir trýsti
- Er tænastusinnaður, vinarligur og dugir at skilja serligu umstøðurnar hjá sjúklingunum og avvarandi

Vit bjóða eitt áhugavert og avbjóðandi starv við møguleika fyri fakligari og persónligari menning. Dagliga arbeiðsplássið verður á Landssjúkrahúsinum í Tórshavn. Lønar- og setanartreytir verða avtalaðar ímillum Atlantic Airways og umsøkjara.

Skrivlig umsókn við prógvum og royndum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 11. novembur 2010. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jákup Sverra Kass (sølu og marknaðarleiðari), jsk@atlantic.fo, tlf. 341044

**Umsókn skal sendast til:**
Atlantic Airways, Starvsfólkadeildin (Human Resources). Att: Georg Suðurgarð, Vága Floghavn, 380 Sørvágur ella til georg@atlantic.fo

sansir.fo

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka, sum veitir flogtænastur við útgangsstøði í Føroyum. Umleið 160 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum. Umsetningurin í 2009 var 402 milliónir krónur. Atlantic Airways hevur fýra flogfør og tvær tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Noreg og Íslandi. Harumframt er virksemið víðfevnt í øðrum londum við leiguflogførum. Tyrludeildin stendur fyri leiti- og bjargingartænastu í Føroyum, tyrluflutningi til útoyggjarnar og frálandaflúgving flúgving við Føroyum sum høvuðsstøð.

Tel 34 10 00 · Faks 34 10 01 ATLANTIC AIRWAYS atlantic.fo

BÓNUS -er bíligari!

Hví gjalda meira ...

Heil íslendsk krov

Fyri kg.

47,-

AVMARKAÐ NØGD

Ikki galdandi í Bónus í Tórshavn